# Floytudagur í Klaksvík



*Myndin er tikin á næmingakonsertini í Ósáskúlanum næstseinasta hósdag, tann 19. oktober 2006. T.v. Betty Vitalis og Ingigerð Tróndheim*

*Mynd: Rúna Sivertsen*

Leygardagin fara floytunæmingar frá teim ymsu tónleikaskúlunum í Føroyum at hava konsert í Christianskirkjuni, við samanspæli og solostykkjum.

Leygardagin 4. november kl. 17.00 verður konsert í Christianskirkjuni í sambandi við at floytudagur er í Klaksvík.

Floytunæmingar frá teimum ymsu tónlistaskúlunum í Føroyum koma saman at venja allan dagin. Aftaná verður konsert við samanspæli og solostykkjum.

Vit eiga nógvar góðar floytunæmingar, og hetta er gott høvi at hoyra tað, tey arbeiða við, sigur Helga Hilmarsdóttir Gerðalíð, leiðari á Klaksvíkar Tónlistaskúla.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Anna Toftheyggj, Hvalba**, andaðist á Suðuroyar sjúkrahúsi mikudagin, 81 ára gomul. Farið verður úr kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsi fríggjadagin kl. 18. Jarðarferðin verður ú Hvalbiar kirkju leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Onnu, kunnu lata eina peningagávu til Hvalbiar missiónshús; konta í Føroya Banka.

**Anna Sofía Andreasen, Vestmanna**, andaðist mikudagin, 83 ára gomul. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum leygardagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju sunnudagin kl.14. Tey, ið vilja minnast Onnu Sofíu, kunnu lata Vestmanna kirkju eina peningagávu. Sungið verður úr Sálmabókini.

**Jens Ferndenand Poulsen**, skipari úr Nólsoy, andaðist mikudagin, 65 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúsinum kapellinum fríggjadagin kl. 15 til Rituna. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13. Í samband við jarðarferðina, siglir Ritan úr Havn kl. 12 og túrurin av Havnini kl. 15 verður útsettur til kl. 16

**Dany í Jógvanstovu, Leirvík**, andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin, 85 ára gomul. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum í Leirvíkar kirkju fríggjadagin kl. 17. åJarðarferðin verður leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Dany, kunnu lata Missiónshúsinum í Leirvík eina peningagávu; konta í Norðoya Sparikassa.

## Tøkk

Øllum tykkum, sum sýndu hjálpsemi og samkenslu, tá elskaði maður, pápi og verfaðir okkara

**Jógvan Vík**

andaðist og varð jarðaður, takka vit hjartaliga.
Takk fyri troystarrík orð í kapellinum og kirkjuni.
Takk fyri blómur og kransar og peningagávur til Sinnisbata.
Takk til øll tykkum, sum á ymsan hátt hjálptu til við jarðarferðini og ervinum. Og ein tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu Jógvan til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Henny, Jóhannes, Jóhan Hendrik, Eyðfríð, Helen og Herbjørn**

## Hjartans tøkk

Ynski eg øllum, sum vóru við til at gleða meg, og gera 95 ára dagin 28. august so hugnaligan.
Harrin signi tykkum øll.
Enn einaferð TØKK.

**Kærar heilsur**
**Petrina Berg, Hvalba**




Les Sosialin so ert tú við


## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, hjálpsemi og troystarrík orð, tá kæri bróður okkara

**Poul Eli Hansen**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum, ið vóru um hann meðan hann var heima.
Tøkk til tykkum á Landssjúkrahúsinum, ið vóru um hann, ta tíðina hann var har.
Tøkk til prestarnar fyri troystarrík orð í kapellinum og Kollafjarðar kirkju.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og gravarar.
Tøkk fyri kransar, blómur og peningagávu til Føroya Felag ímóti Krabbameini, og til tykkum øll, ið á ymsan hátt hjálptu til við jarðarferðina og ervinum.
Tøkk til øll tykkum mongu, ið fylgdu Poul Eli til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Kirstin, Maria, Hans Jacob, Johannes og Anton**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu og hjálptu okkum, tá ið kæri sonur mín, pápi, verfaðir, abbi og bróðir okkara

**Kári av Reyni**

andaðist og varð jarðaður.

Vit takka øllum, ið fylgdu Kára til hansara seinasta hvíldarstað her á foldum.

**Elsa**
**Andreas og Oddur**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálptu til tá okkara kæra systir

**Óluva Húsgarð**
Tórshavn

andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur og kransar og tøkk til tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Per, Tróndur og Bjarni**